Poul Geert Hansen

Fra: Sigurð Ó. Vang
Sendt: mikudagur, 27. juli 2022 21:27
Til: Sverri Joensen; Mentamálaráðið
Cc: Sigurd Lamhauge
Emne: Sv: Uppskot til broyting av heimildarlóg viðv. nýggjum húsarhaldsskúla í Klaksvík til ummælis - SVAR LV 27. juli 2022

UMMR,

Góðan dagin,

Víst verður til hoyringsuppskot til ummælis - Uppskot til broyting av heimildarlóg viðv. nýggjum húsarhaldsskúla í Klaksvík, dagfest 20. juli 2022 við freist 27. juli 2022.

LV hevur fylgjandi viðmerkingar:

Viðvíkjandi Pkt. 2.2 í lógaruppskotinum - Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Vanligt hevur verið, at LV virkar sum ráðgevi hjá Mentamálaráðnum í sambandi við onnur líknandi mál viðv. studningi/stuðli til uttanhýsis partar, og vil LV eisini í hesum máli vera til taks tí viðv. sbrt. nærri uppgávulýsing.

Viðv. fylgiskjalinum 'Byggikostnaður'
LV hevur ikki havt høvi til at gjøgnumganga øll skjølini í verkætlanini, men hevur yvirskipað hesar viðmerkingar og tilmæli serliga við støði í excel-arkinum "Byggikostnaður":

- Mæla til at meta um støddin á upphæddini til óvissur (ella ókent) er nøktandi, og um upphæddin eisini skal kunna fevna um møgulig tilkeyp?
Sum skilst hevur ætlaði arbeiðstakarin latið tilboð har bæði nøgdir (ABF06 § 3, stk. 4) og indeks (prís- og lønarvøkstur sbrt. ABF06 § 22) eru læst endaliga og íroknað fyri alt byggitíðarskeiðið, og í sofall eru týðandi váðar tiknir úr. Hartil koma váðar m.a. viðv. lendinum og um projekttilfarið (tekningar, arbeiðsfrágreiðingar v.m.). eru á nøktandi dygdarstigi.
At taka hædd fyri í 'óvissur' um t.d. byggiplássrakstur viðv. el&hita, íbindingar, trygging v.m. vera hægri enn mett t.d. um byggitíðin verður longri enn ætlað.

- At tað fyriliggur greið avtala við høvuðsráðgevan um øll viðurskifti framyvir (projektuppfylging, fakeftirlit og byggileiðslu), og eisini um byggitíðin ikki heldur og herundir eisini indeks. Umframt at fáa vissu fyri, at nøktandi dygdargjøgnumgongd (kvalitetssikring) er gjørt av projektinum, og at allar endaligar tekningar og arbeiðslýsingar/-frágreiðingar fyriliggja (eisini tá uppskotini hjá arbeiðstakaranum til broytingar eru gjørdar), soleiðis at høvuðsarbeiðstakarin ikki í nakran týðandi mun kann gera krøv tí viðvíkjandi.

Endalig skjøl
Áðrenn UMMR gevur endaliga stuðuls-/studningstilsøgn vil LV mæla til, at øll endalig skjøl (arbeiðstakarasáttmáli og ískoyti til ráðgevarasáttmála) fyriliggja samlað, og herundir sáttmáli við Bústaðir um teirra tilskilaða part av bygninginum, og um evt. markamót tí viðv., umframt endalig avtaluviðurskifti við Klaksvíkar kommunu um fígging og lendi og annað í hesum sambandi.

Viðv. stýrisbólki og byggikønum ráðgeva hjá skúlanum

Ávís upphædd er sett av til ráðgeva hjá skúlanum/stýrisbólkinum. Hetta metir LV er skilagott, og vil kunna tryggja eina skikkaða fakliga ráðgeving hjá skúlanum yvirfyri veitarunum.

Eru spurningar er LV til taks!

Bestu heilsur

Sigurð Ó. Vang
deildarleiðari, Verkætlanardeildin, Landsverk

Fra: Sverri Joensen <SverriJ@ummr.fo>
Sendt: 20. juli 2022 13:28
Til: Landsverk <lv@lv.fo>; Fíggjarmálaráðið <fmr@fmr.fo>; klaksvik@klaksvik.fo <klaksvik@klaksvik.fo>
Cc: Bjarni Wilhelm <bjarniwilhelm@outlook.com>; johanna@husarhaldsskulin.fo <johanna@husarhaldsskulin.fo>; Sigurð Ó. Vang <SiVa@lv.fo>; Sigurd Lamhauge <SiLa@lv.fo>; Atli Suni Leo <Atli@fmr.fo>; karl@klaksvik.fo <karl@klaksvik.fo>; runir@klaksvik.fo <runir@klaksvik.fo>; marjun@bustadir.fo <marjun@bustadir.fo>; allan@bustadir.fo <allan@bustadir.fo>; andras <andras@bustadir.fo>
Emne: Uppskot til broyting av heimildarlóg viðv. nýggjum húsarhaldsskúla í Klaksvík til ummælis

Til hoyringspartarnar,

Við hesum verður sent tykkum til ummælis:

- Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg nr. 68 frá 9. mai 2019 um studningslán til at byggja húsarhaldskúla í Klaksvík

Sambært § 1, stk. 1 í galdandi heimildarlóg hevur landsstýrismaðurin heimild at veita studningslán til at byggja nýggjan húsarhaldsskúla í Klaksvík, í mesta lagi 21 mió. kr. Við ætlaði løgtingslógarbroytingini verður hendan upphædd hækkað til 37.3 mió. kr., ið verður latin sum eitt studningslán.

Harumframt fær landsstýrismaðurin heimild at lata stuðul til keyp av innbúgvi og útbúnaði upp til 5 mió., kr., tó treyta av, at Húsarhaldsskúli Føroya fær til vega 50% av fíggingini í samband við keyp.

Endamálið við løgtingslógarbroytingini er at tryggja neyðugu fíggingina til at byggja nýggjan húsarhaldsskúla í Klaksvík.

Møguligar viðmerkingar skulu sendast til Uttanríkis- og mentamálaráðið á teldupost sverrij@ummr.fo innan tann 27. juli 2022.

Vinarliga / Sincerely

Sverri Joensen
Løgfrøðingur, cand. jur. / Legal Adviser
Mobile: +298 555056 / Office: +298 306500
sverriJ@ummr.fo / www.ummr.fo

UTTANRÍKIS- OG MENTAMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF FOREIGN AFFAIRS AND CULTURE
Tinghúsvegur 5-7 / FO-110 Tórshavn / Faroe Islands